# Frakland skyldar nógv

Í Fraklandi er skuldin hjá tí almenna vaksin sera nógv tað seinasta árið. Hagstovan í París sigur, at tann 30. juni var tann almenna skuldin 1.428 milliardir evrur. Tað merkir, at skuldin vaks 3,9 prosent í øðrum ársfjórðingi. Tað merkir, at skuldin er nú oman fyri 70 prosent av tjóðarframleiðsluni ella væl oman fyri hámarkið hjá ES, sum er 60 prosent. Franska stjórnin hevur í seinastuni arbeitt við fíggjarlógini fyri 2010. Tað ljóðar, at stjórnin fer at geva fólki skattalætta, sum fer at økja ta almennu skuldina uppaftur meiri, skrivar AFP úr París.





Millum fimti og tíggjundi hvør bramafiskur hevur ein "parasitt", sum líkist eini blommu. Parasitturin er kortini púrasta vandaleysur og kann skolast burtur, og holið skerast burtur

Mynd: Rógvi K. Mouritsen

har hann sat. So, er flakið klárt at tilreiða.

Rógvi sigur, at tað eru tvey sløg av bramafiski, og bæði eru sædd undir Føroyum.

- Fiskurin, vit tosa um og sum ávísar nøgdir verða fingnar av, er bramafiskur. Hin verður róptur silvur bramafiskur og er minni vanligur um okkara leiðir. Mær vitandi eru bert nakrir fáir silvur bramafiskar veiddir undir Føroyum.

Hann sigur, at vanligt er, at bramafiskur, sum bátar og skip fáa uppi í veiðini um sumrarnar og heystarnar, stingur av aftur, tá ið sjógvurin gerst kaldari.

Á latíni verður bramafiskur róptur brama brama.

### Sjóprónur burtur

Fyri einum trimum árum síðan fekst væl av sjópróni (entelurus aequoreus) undir Føroyum. Meðan bramafiskur ikki er vanligur at síggja inni við land, kundi sjóprónur saktast síggjast í sjónum inni á firðum og sundum.

- Eg haldi ikki, vit kunnu siga, at nógv tekin eru um, at fleiri fiskasløg, sum liva syðri í Atlantarhavinum, hava leitað sær norðureftir til okkara leiðir. Ábendingar vóru kanska um hetta fyri nøkrum árum síðan, men í dag er líkt til, at minni kend fiskasløg hava leitað sær suðureftir aftur, heldur Rógvi K. Mouritsen.

Hann sigur, at meðan sjóprónur kundi síggjast í stórum tali, eitt nú í 2002 og 2003, minkaði hetta fiskaslag um okkara leiðir, sum árini gingu.

- Í 2006 sóust bert fáir sjóprógvar undir Føroyum, og síðan 2007 er fiskurin at kalla ikki sæddur í okkara sjógvi.

Rógvi sigur, at sjóprónur er ikki ein fiskur, sum hevur verið uppi í føroyskari veiði, men er serliga sæddur í maganum á øðrum fiskasløgum.

- Eitt skifti, tá sjófuglinum vantaði nebbasild, var líkt til, at fuglur tók sjóprón til føði hjá ungum sínum. Mær er sagt, at fólk tá kundu finna lundapisur deyðar við sjónpróni upp úr hálsinum.

Hann vísir á, at fiskurin er ógvuliga klænur og er vanliga einar 40 sentimetrar langur, og tí er ógvuliga ivasamt, hvussu væl egnað føði sjóprónur er hjá sjófugli og ungum teirra.

- Sjóprónur er sum ein stokkur til tjúktar, og eg haldi, at hann líka sum kvaldi pisurnar, leggur hann aftrat.

Hann sigur, at tað ikki var óvanligt, at útróðrarmenn sóu sjóprón svimja uppi í sjónum framvið bátssíðuni.

- Men eitt hvørt er hent, tá hetta fiskaslag at síggja til nú er burtur úr føroyskum sjógvi, sigur Rógvi K. Mouritsen á Havstovuni



*Í eini tíð, tá sjófuglinum vantaði føði, tók fuglurin sjóprón til pisur sínar, men hetta riggaði eftir øllum at døma ikki serliga væl, tí pisur lógu kvaldar við sjópróni upp úr hálsinum*

*Mynd: Rógvi K. Mouritsen*

# Fiskaprísir rætta vegin

**- Tað letur til, at fiskaprísirnir eru farnir rætta vegin, men nú bíða vit spentir eftir at síggja, hvussu verður, tá fiskiflotin rættiliga kemur í gongd aftur. Vit fegnast um, at Kósavirkið letur uppaftur, og at eftirspurningurin soleiðis verður størri, sigur Jens Chr. Olsen, stjóri á Fiskamarknaði Føroya**

FISKAPRÍSIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskaseljarar hava leingi gramt seg um, at ov fáir keyparar hava verið til fiskin á marknaðinum. Nú keypsavtala er gjørd um stóra fiskavirkið á Kósini, sum væntandi letur uppaftur um einar 2-3 vikur, eru útlit til, at heldur størri kapping fer at verða um fiskin.

Fiski-og útróðrarmenn hava verið sera misnøgdir við fiskaprísirnar tað mesta av hesum árinum, og tað hevur ikki gjørt støðuna betri, at lítið hevur verið at fingið av toski og hýsu.

### Rætta vegin

Stjórin á Fiskamarknaði Føroya, Jens Chr. Olsen, sigur, at fiskaprísirnir í seinastuni hava gingið rætta vegin, sum hann tekur til.

- Jú, líkt er til, at prísirnir sum heild kvinka uppeftir. Tað letur til, at so er.

Hann heldur, at næstu vikurnar fara at geva eina enn betri ábending um, hvør gongdin verður og um tær ábendingar, hann heldur seg síggja í dag, fara at vísa seg, sum heystið gongur.

- Jú, vit eru ógvuliga spentir eftir at síggja, hvussu verður, tá allur flotin er komin í gongd aftur, sigur hann.

Stjórin á Fiskamarknaði Føroya sigur seg fegnast um, at Kósavirkið letur uppaftur, og hann væntar, at eitt so stórt virki hevur sína ávirkan á kappingina um fiskin.

- Vit hava sæð eina ávísa prísøking á eitt nú toski og hýsu og øðrum fiskasløgum við.

Toskur liggur úr 15 krónur fyri kilo og uppeftir, og hýsa liggur millum 10 og 13 krónur fyri kilo.

- Hetta er eisini tíðin, tá fiskurin plagar at fáa betri prís. Fiskurin er betri til dygdar um heystarnar enn um summarið, og kuldin í veðurlagnum ger sítt til, at fiskurin vanliga heldur sær betri.

Jens Chr. Olsen vísir á, at tað í størri mun enn nakað annað er útboð og eftirspurningur sum avgera prísstøðið.

- Í fjør heyst, tá nógv var frammmi um heimskreppu, gjørdist útlendski marknaður trekur, serliga tá ræður um tey dýraru fiskasløgini, men nú er líkt til, at marknaðurin í ávísan mun hevur hug at lata seg uppaftur.

### Kortini lægri

Vit spurdu eisini Jens Chr. Olsen, hvussu prísstøðið er í heyst í mun til heystið 2008, men her er eingin ivi.

- Fiskaprísirnir eru ikki komnir upp á aftur tað, teir vóru fyri prísfallið, og enn vantar nakað í, leggur hann aftrat.

Stjórin vísir á, at framvegis kemur lítið av upsa um uppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya, og hetta heldur hann vera spell, tá stórt gjøgnumskygni er á fiskamarknaðinum.

- Tá skipini landa beinleiðis til virkini, kann upsaprísurin á fiskamarknaðin ikki brúkast sum grundarlag undir prísmetingini. Av samlaðu upsanøgdunum, sum verða landaðar í Føroyum, eru nøgdirnar, sum seldar verða um uppboðssølu, alt ov smáar til tess, at hesar kunnu brúkast í nakrari samanbering, sigur Jens Chr. Olsen.